

Jóanes N. Dalsgaard, stjórnmálafrøðingur: – Fánar hetta málið bara burtur, og ongin verður drigin til svars, fær tað sera negativa ávirkan á álitið á politisku skipanina

At løgmaður segði alt hetta, og at tingið nú fyrireikar eitt rættarligt ábyrgdarmál ímóti landsstýrismonnunum, er sera týdningarmikið, heldur stjórnmálafrøðingurin, Jóanes N. Dalsgaard, ið hevur lisið frágreiðingina hjá løgtingsins umboðsmanni. Hann heldur frágreiðingina vera sera álvarsliga, tí hon gevur týðiligar ábendingar um, at tað við trýsti hevur eydnast einstaklingum at uppnáa sømdir frá tí almenna, sum rættarligt grundarlag ikki var fyri.

– Tað er týðiligt í frágreiðingini, at advokaturin hjá umsøkjarunum stýrir málinum. Hóast hansara argumentatión í nógvum førum kann tykjast bæði mangulfull og manipulerandi, so eydnast honum at sannføra fyrisitingina um at ganga honum á møti. M.a. fær hann Innlendismálaráðið at gera eina kúvending í málinum, sum umboðsmaðurin diplomatiskt kallar óskiljandi. Hetta bendir á, at fyrisitingin er ov veik, og at hon ov lættliga letur seg ávirka, sigur Jóanes N. Dalsgaard.

Spurdur, um frágreiðingin avdúkar, at Føroyar hava eina almenna umsiting, har hóttanir og trýst eru gerandiskostur, svarar hann, at tey, sum kenna til almenna fyrisiting í Føroyum, vita, at samfelagið er lítið, og at egináhugamálini eru øgiliga tætt upp at tilgongdunum í fyrisitingarmálum. Føroyskir fyrisitarar mugu vera sera støðugir at standa ímóti egináhugamálum, um teir skulu halda armslongdarprinsippið í hevd mótvegis øllum, ið royna at ávirka málini til egnan fyrimun, heldur hann.

– Vit síggja javnan, at fyrisitingarmál koma so langt sum í sjálvt tingið, og hetta ger ikki arbeiðið hjá fyrisitingini lættari. Vanliga megnar fyrisitingin at varðveita í minsta lagi eitt toluligt støði av sakligheit í sínum arbeiði, men í grannskoðarafrágreiðingini hjá løgtingsins umboðsmanni síggja vit eitt dømi, har sakligheitin fyri tað mesta tykist vera farin fullkomiliga fyri borð, sigur Jóanes N. Dalsgaard.

> Um borgararnir nú uppliva, at hetta málið, sum snýr seg um, at okkurt er spinnandi galið í skipanini, heldur ikki fær avleiðingar, so ivist eg í, hvussu nógvur legitimitetur verður eftir í politisku skipanini

## Missir legitimitet

Løgmaður nevndi í tinginum, tá hann bar fram síni sjónarmið um frágreiðingina, at almenningurin er troyttur av, at onki í Føroyum fær avleiðingar. Hesum tekur Jóanes N. Dalsgaard undir við. Talan er um ein troyttleika, ið fyrst og fremst kemur til sjóndar sum líkasæla og djúpt misálit á politisku skipanina, heldur hann. Hetta skaðar fólkastýrið illa, tí fólk tíma ikki at taka lut í politiska orðaskiftinum ella politikki yvirhøvur. Tey kenna seg bara svikin.

– Fólk flest eru von við, at tá tú stígur við síðuna av, fær tað avleiðingar. Um vit gloyma okkurt smávegis í sjálvuppgávuni, kemur TAKS eftir okkum, og parkera vit ólógliga, fáa vit bót. Tá eyðsýndar politiskar gølur so taka seg upp, og fólk uppliva, at politikarar og fyrisiting renna undan ábyrgd, missa fólk virðingina fyri myndugleikunum, og myndugleikarnir missa sín legetimitet, sigur Jóanes N. Dalsgaard.

Hetta heldur hann vera sera álvarsamt, tí ein skipan við høgum legitimiteti er nógv einfaldari og bíligari at reka enn ein skipan við lágum legitimiteti.

– Tá fólk hava álit á skipanini, eru tey sinnað at fylgja reglum og ásetingum hjá myndugleikunum, og neyðugt er tí ikki við so nógvum eftirliti. Øðrvísi er, um skipanin hevur lágan legitimitet. Tá hava fólk hug at gera, sum teimum lystir, og skipanin má brúka nógva orku upp á eftirlit og stýring. Vert er at hava í huga, at líkamikið um skipanin er legitim og effektiv ella illegitim og ineffektiv, so skulu vit øll gjalda fyri hana, vísir hann á.

Spurningurin er so, hvørja ávirkan málið um løggildu grannskoðararnar hevur á álitið á politisku skipanina og umsitingina. Jóanes N. Dalsgaard ivast ikki:

– Um borgararnir nú uppliva, at hetta málið, sum snýr seg um, at okkurt er spinnandi galið í skipanini, heldur ikki fær avleiðingar, so ivist eg í, hvussu nógvur legitimitetur verður eftir í politisku skipanini. Fánar hetta málið bara burtur, og ongin verður drigin til svars, fær tað sera negativa ávirkan á álitið á politisku skipanina. Verður hetta málið hinvegin gjølla kannað og fær avleiðingar, vænti eg, at tað kann styrkja álitið á politisku skipanina. Ikki minst vænti eg, at avleiðingar í málinum kunnu vera við til at búna skipanina.